# Tað almenna má seta gongd á granskingina

**– Vit ætla okkum hvørki at stýra granskingini ella lívga ávísum vinnum, men vit vilja gera eina roynd at kickstarta føroyska vinnugransking, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum**

GRANSKING
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*


*– Vit hava sett okkum fyri at velta upp úr nýggjum, og um ikki tað almenna stendur við sína ábyrgd og fær gongd á føroyska vinnugransking, so hendir ov lítið ov seint, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum*

Vinnumálaráðið ætlar sær at gera eina roynd at fáa í gongd vinnugransking í Føroyum, men politiski myndugleikin ætlar sær hvørki at stýra granskingini ella lívga ávísum vinnum.

Tað sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum, eftir bæði formaðurin í Búskaparráðnum og fyrrverandi formaður hava funnist at ætlanunum hjá Vinnumálaráðnum.

– Vit hava sett okkum fyri at velta upp úr nýggjum, og um ikki tað almenna stendur við sína ábyrgd og fær gongd á føroyska vinnugransking, so hendir ov lítið ov seint, sigur Bjarni Djurholm.

– Vit vita ikki, um okkara ætlan fer at heppnast, men vit vilja gera eina roynd at kickstarta føroyska vinnugransking, tí vit hava brúk fyri nýggjum vinnum í Føroyum, sigur hann.

### Kann gerast spill av pengum

Ein arbeiðsbólkur hjá Vinnumálaráðnum hevur júst gjørt eitt tilmæli um ein føroyskan granskingardepil, sum serliga skal granska í biotøkni og biokunning. Ætlanin er at brúka 90 milliónir krónur til at byggja og seta gongd á hendan granskingardepil.

Men tað eru ikki øll, sum taka undir við hesari ætlan.

Í gjár segði formaðurin í Búskaparráðnum við Sosialin, at hann helt tað kundi gerast spill av pengum, um tað almenna fer at brúka 90 milliónir krónur til vinnugransking, sum tað almenna ikki hevur skil at standa fyri.

– Tað almenna skal skipa fyri gransking í almennum viðurskiftum, sum kunnu koma okkum øllum til góðar. Hinvegin skal tað almenna ikki blanda seg upp í og als ikki royna at stýra vinnuligari gransking. Tað skal vinnan sjálv gera, tí politikarar hava ikki skil fyri tí, segði Johnny í Grótinum við Sosialin í gjár.

Fyrrverandi formaðurin í Búskaparráðnum og limur í Granskingarráðnu, Hermann Oskarsson, segði við Dag og Viku týskvøldið, at tað er ikki ein almenn uppgáva at skipa fyri vinnugransking, soleiðis sum ætlanin nú er.

### Landsstýrið vil skunda undir

Landsstýrismaðurin við vinnumálum, sum skal føra nýggju granskingarætlanina út í lívið saman við restini av landsstýrinum, er als ikki samdur við atfinningunum frá Johnny í Grótinum og Hermann Oskarsson.

– Teir hava ikki lisið álitið í tí andanum, sum tað er skrivað. Okkara ætlan er júst at seta gongd á nakað nýtt og skapa karmar, og vit skulu ikki stýra granskingini ella lívga ávísum vinnum, sigur Bjarni Djurholm.

– Vit hava hugt eftir, hvussu tey gera í øðrum londum, og har tað vanligt, at kommunur, amt ella landið taka stig til granskingina og skapa karmarnar. Vit hugsa ikki bara teoretiskt, men vilja virka fyri, at nýggjar vinnur kunnu gerast veruleiki í Føroyum, sigur hann.

Bjarni Djurholm sigur, at ætlanin hjá landsstýrinum er, at granskingardepilin eftir trý ár skal vera sjálvberandi við eksternari fígging. Tí er uppgávan hjá landinum í hesum føri bara at seta gongd á granskingina og skapa góðar karmar til onnur at virka undir.

## 90 milliónir at byrja við

**Arbeiðsbólkur roknar við, at tað kostar 90 milliónir krónur at seta gongd á føroyska granskarapark**

GRANSKING
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Arbeiðsbólkurin, sum hevur gjørt tilmæli um føroyska granskarapark, hevur gjørt eina meting av, hvat tað fer at kosta at fáa ein føroyskan granskingardepil at virka.

Arbeiðsbólkurin mælir í fyrstu syftu til, at 7 milliónir krónur verða settar av til projektering og forkanning av granskaraparkini.

Síðani skal tað almenna yvir trý ár játta samanlagt 70 milliónir til byggingina av parkini.

Arbeiðsbólkurin heldur, at tað fyrstu árini eisini verður neyðugt við pengum til rakstur. Bólkurin mælir til, at í fyrstu atløgu verður játtað granskaraparkini fígging til rakstur fyrstu fýra árini.

– Meting um rakstur og fíggjartørv verður síðani gjørd eftir fýra árum, hvørt almenn játtan framvegis er neyðug. 4 mió. kr. verða játtaðar fyrsta árið, og næstu árini verður árliga játtanin 3 mió. kr., skrivar arbeiðsbólkurin í tilmælinum.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at peningur verður játtaður til at seta trý granskingarprofessorat innan ávikavist human genomics, ídnaðarlig biotøkni og djóra genomics. Hesi skulu gera sítt til at granskingin í parkini verður á høgum altjóða støði.

– Mett verður, at hvørt professoratið fer at kosta einar 1,5 - 2,0 mió kr. um árið og eina granskarajáttan á uml. 5,0 mió kr. um árið. Professoratini verða tíðaravmarkað til 5 ár, skrivar arbeiðsbólkurin.

Bólkurin heldur eisini, at granskaraparkin skal draga til sín eksterna fígging og verkætlanir, sum skulu fíggja raksturin.

Samanlagt skal tað almenna brúka 90 milliónir krónur til at fáa granskaraparkina at virka umframt eina serliga granskarajáttan á fimm milliónir um árið.

# Landssjúkrahúsið skal styrkjast og styrkja

**Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum, hevur mælt landsstýrismanninum við heilsumálum til at gera Landssjúkrahúsið til eitt Universitetssjúkrahús, tí tað hevði sampakkað væl við nýggju granskingarætlanina hjá landsstýrinum**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Stendur tað til landsstýrismannin við vinnumálum, fær Landssjúkrahúsið í Havn eisini ein leiklut í nýggju granskingarætlanini hjá landinum.

Bjarni Djurholm heldur, at Landssjúkrahúsið skal fáa heitið sum Universitetssjúkrahús og verða við í einum samstarvi við eina nýggja føroyska granskingarpark.

– Tað hevði styrkt Landssjúkrahúsið og givið tí eitt annað status, um tað gjørdist eitt Universitetssjúkrahús og harvið kundi blivið enn meira attraktivt hjá læknum og øðrum útbúnum starvsfólkum. Universitetssjúkrahúsið kundi so verið við í einum samstarvi við nýggja granskingardepilin, heldur Bjarni Djurholm.

Hann hevur á landsstýrisfundi heitt á Hans Paula Strøm, landsstýrismann við heilsumálum, um at virka fyri at gera Landssjúkrahúsið til eitt Universitetssjúkrahús, og ætlanin er at taka hetta upp meira formliga seinni.

– Hetta hevði sampakkað væl við granskingarætlanina hjá landsstýrinum og eisini við nýggju lóggávuna um ílegugransking, sum var eitt tað størsta frambrotið í seinastu tingsetu, sigur Bjarni Djurholm.